# Lesandi á Christiansborg

Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi bjóðar nú øllum føroyskum og grønlendskum lesandi í Danmark inn á Christiansborg til upplýsandi fund um arbeiðið á Fólkatingi fríggjadagin 31. mars.

Samstundis fáa tey lesandi møguleikan at hoyra og kjakast við m.a. sosialdemokratiska formannin Helle Thorning-Schmidt, umhvørvismálaráðharran Connie Hedegaard (K), undirvísingarmálaráðharran Bertel Haarder (V) og framsøgumannin í uttanríkismálum hjá Dansk Folkeparti, Søren Espersen. Umframt hetta kemur formaður fólkatingsins Christian Mejdahl (V) framvið. Á fundinum fara hesir framstandandi politikarar at bera sínar hugsanir fram um samstarvið millum Danmark, Føroyar og Grønland. Eftir hvørja framløgu verður kjak á skránni, har tey lesandi hava møguleikan at luttaka.

Teir tríggir fólkatingslimirnir í Norðuratlantsbólkinum, Høgni Hoydal (Tjóðveldisflokkurin), Kuupik Kleist (IA) og Lars-Emil Johansen (Siumut) fara eisini at greiða frá arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi. Tiltakið byrjar kl. 13 og verður væntandi liðugt umleið kl. 17.

Áhugað kunnu tekna seg til tiltakið hjá skrivarunum hjá bólkinum, sum eru Heini í Skorini og Mininnguaq Kleist.

**-mørk**



# Líðingar í Snarskivuni

Torbjørn Olsen letur hósdagin upp framsýning í Snarskivuni í Havn. Framsýningin ber heitið, Líðingar, er talan um átta stór steinprent, sum Torbjørn Olsen og Grafiski Verkstaður Føroya hava staðið fyri.

Torbjørn hevur í mong ár arbeitt við líðingartemaum í altartalvum, sum hann hevur staðið fyri. Á grafiska verkstaðnum hevur hann í samband við framsýningina gjørt royndir við at umseta hesi myndaevni til steinprent.

**-mørk**


FERÐAFRAMSÝNING




**Myndir , tekningar v.m. frá tiltakinum verða at síggja í Føroya Banka**

Føroya Banki hevur stuðlað tiltakinum UNG Í FØROYUM 2006, og sum liður í hesum verður skipað fyri eini ferðandi framsýning í deildum bankans.

Framsýningarnar verða frá týsdegi kl. 9.30 til og við hósdag kl. 18.00 á hesum støðum:

| | |
|---|---|
| Tórshavn | 14.-16. mars |
| Sørvágur | 21.-23. mars |
| Sandur | 28.-30. mars |
| Fuglafjørður | 4.-6. apríl |
| Klaksvík | 11.-12- apríl |
| Tvøroyri | 18.-20. apríl |

kontoIN


# Framburðsfelagið skiftur ikki navn

**Hóast uppskot var fyri aðalfundin um navnabroyting, so varð hendan kortini av ongum**

AÐALFUNDUR
*tíðindaskriv*

Havnar Framburðsfelag hevði sum vant aðalfund á Grækarismessu.

Eitt punkt á skránni var uppskot um at broyta navnið á felagnum til Suðurstreymoyar Fólkafloksfelag. Hetta tí at fá uttanfyri felagið vita, at Havnar Framburðsfelag er lokalfelagið hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymi, og øll hini lokalfeløgini bera heitið hjá flokkinum. Aðalfundurin vísti á, at felagið eitur Havnar Framburðsfelag (valfelag Fólkafloksins í Suðurstreymoy) og kunnu bæði heiti tí nýtast. Navnið er eisini søguligt og felagið hevur eina spennandi og týdningarmikla søgu, sum alt ov fá kenna til. Aðalfundurin avgjørdi, at nevndin skuldi lýsa hesa søgu nærri og avgjørdi at navnið á felagnum varð óbroytt.

Aage Arnoldson takkaði fyri seg í nevndini og ynskti ikki at stilla uppaftur. Aage hevur sitið í nógv ár í nevndini og verið ein dyggur stuðul fyri felagið. Nevndin skjeyt upp at velja Regin W. Dalsgaard í nevndina í staðin, og aðalfundurin tók undir við hesum. Regin W. Dalsgaard er skrivari hjá tingbólkinum og hetta styrkir um samstarvið við tingmanningina.

Tá aðalfundurin var lokin skipaði nevndin seg við Poul Laust Christiansen sum formanni, Maritu Hentze sum kassameistara, Regin W. Dalsgaard sum skrivara og Elsa í Garði og Heðin D. Poulsen sum vanligir nevndarlimir. Jan Christiansen og Inga Dahl vóru afturvald sum varalimir.


